# Hilmar Persson

**1942-2009**



Nú er ein tíð fráliðin síðani Hilmar andaðist aftaná drúgva og álvarsliga sjúku.

Hilmar byrjaði longu sum 14 ára gamal sum gravari hjá telefonverkinum, fyrstu árini sum tímaløntur og síðan í føstum starvi. Seinni aftur varð Hilmar formaður fyri alt kaðalarbeiði í Suðuroynni.

Í 1968 kom eg sjálvur í starv hjá telefonverkinum, og skjótt hittust vit, tá ið eg ferðaðist har suðuri saman við Svend á Grundini, kaðalmeistara.

Hilmar var nærlagdur sum fáur, og tað man verða honum at takka fyri, at kærur um telefon vóru ókendar har á oynni.

Sjálvur tók hann altíð lut í arbeiðinum bæði sum gravari, at skoyta kaðalar og at dagføra øll kaðalskjøl.

Arbeiðið fór fram bæði í bleytum haga og í hørðum, asfalteraðum vegi, og eyðkent fyri Hilmar so evnaði hann til bæði spaka og haka til bleytan haga og harðan veg.

Hjá einum og hvørjum televeitara er kaðalskipanin nógv tann størsti íløguparturin. Tí er góðskan av hesum avgerandi fyri televeitaran. Við góðum viðlíkahaldi og skynsemi er netið beinagrindin í einum vælvirkandi samskifti. Hetta verður ofta gloymt, tí netið liggur fjalt í jørðini.

Her slóðaði Hilmar fyri ikki einans í tí dagliga; men við nýhugsan. Allastaðni rundan um okkum er ein partur av kaðalnetinum eisini kaðalskáp har nógvar umkoblingar fara fram í øllum veðri. Í okkara veðurlagi eru hesi skáp ikki vælegnað. Her kemur Hilmar við slóðbrótandi hugskoti, sum hann eisini sjálvur setti í verk. Verkfrøðingurin Eivin Hansen, sáli, og eg viðurkendu hansara grundgevingar og komu hansara kaðalhús at verða bygd um alt landið. Talið man tátta í eitthundrað tilsamans.

Inni í hesum smáttum er í dag ikki einans kaðalútgerð, men eisini telduútgerð, so allir felagar kunnu fáa sama tænastustøði um alt landið.

Seinasta tíðin hjá Hilmar var tung at bera við pínufullari sjúku. Hann varð 67 tann 4. mei 2009.

Dagurin varð hildin á Suðuroyar Sjúkrahúsi, har starvsfólkini gjørdu alt fyri at løtan var hugnalig og virðilig. Næstrafólk og gamlir starvsfelagar frá telefonverkinum vóru rundan um hann, og í løtum kendu vit aftur tann hugnaliga Hilmar altíð við tí góða orðinum. Stutt eftir andaðist hann, tann 5. juni 2009.

8. juni var jarðarferðin úr Tvøroyrar Kirkju. Stóra kirkjan var fullsett. Rundan um Trongisvágsfjørð veittraðu fløggini í hálvari stong eins og tað varð flaggað í hálvari stong nógva staðni í oynni.

**Sólbjørn Jacobsen**

# Tummas í Heiðriksstovu til áminningar

Tað kom okkum, ið kendu Tummas Joensen í Heiðriksstovu, dátt við at hoyra, at hann so bráddliga 2. desember legði árarnar inn. At leggja árarnar inn er rætta myndin at nýta, tá ein lítur at lívsleiðini hjá Tummasi, tí hann var dasti av vaksnamannalívi sínum í báti og við skipi.



Tummas í Heiðriksstovu var nólsoyingur, f. 8. november 1934. Sonur Valborg Debes úr Kollafirði og Jógvan Joensen i Heiðriksstovu í Nólsoy. Tummas vaks upp í Heiðriksstovu, sum elsti sonurin í einum barnaflokki á 9 børn. Aftrat kann nevnast at fleiri av ættarfólkunum í Kollafirði stundum vóru rættiliga nógv og leingi í Heiðriksstovu. Ja, onkur teirra vaks upp í Heiðriksstovu, so mangan vóru nógvir munnar at metta í húsinum. Hetta tyktist ikki at bila, tí hjartarúmið var stórt í Heiðriksstovu. Eisini var Heiðriksstova stórt óðalshús við neytum og tí, ið fekst úr haganum og úr sjónum. Veiðumenn hava heiðriksstovumenninir altíð verið og skilamenn á sjógv. Við báti teirra, nevndur Prestur, var mangur gyltur fongurin drigin av grunni.

Í hesum umhvørvi vaks Tummas upp. Hann tók til sín alt tað besta ein stór kjarnufamilja, ið var grundfest í føroyskari mentan, hevði at bjóða, bæði andaliga og handaliga. Heiðriksstovu stólarnir í kirkju og til møtir í Missiónshúsinum stóðu ongantíð tómir. Hetta varð lagt niður í Tummas og syskini, og henda førning hevði Tummas alt lívið innanborða, sjálvt um hann flutti av bygdini.

Tummas byrjaði vaksnamannalívið á sjónum. Hann fór til skips á ungum árum, og trúgvur sum hann var, var hann bert til skips við tveimum skipum, áðrenn hann fór á Sjómansskúlan, har hann tók stýrimansprógv. Sum fiskimaður sigldi Tummas mestu tíðina við Elsu av Toftum, ið Hans Jacobsen í Norðastovu átti og førdi. Var eisini við Grønlandsfarinum, ið bygdarmaðurin Tummas hjá Klæminti í Nólsoy førdi.

Eftir lokið stýrimansprógv í 1960 fór Tummas út at siga við DFDS. Sigldi eisini við skipum hjá Skipafelagnum til hann fór í land. Sum heimamaður arbeiddi hann hjá Meiarínum. Fyrst saman við verðfaðirinum, Edvardi Lindenskov, og so einsamallur til fyritøkan legði niður virksemið. Seinasta starvið, sum Tummas hevði, var innan flakavinnuna á landi. Á Bacalao virkaði hann til hann náddi eftirønaraldur.

Lyndiseyðkenni Tummasar var trúskapur móti næstrafóki og bygdarfólki, og tí sum hevði týdning fyri Nólsoy. Hann gleddist um alt, sum var bygdini at frama. Hann fylgdi við áhuga, hvussu bygdin og bygdafólkið hevði tað. Hevði mangan á munni, tá vit sóust: Er nakar nólsoyingur á hospitalinum.

Tummas vitjaði nevniliga fegin teir nólsoyingar, sum vóru innlagdir vegna sjúka. Persónliga sýndi hann mær gleði, takksemi og virðing við at koma til framløguna av bókaverkinum Nólsoy – Søgubrot og fólk, ið eisini var seinasta bókin, hann hevði í hondum. Tummas hevði eitt stórt hjarta fyri tí, hann sum unglingi fekk úr Nólsoy, og hann nýtti eitt hvørt høvið at sýna bygdini og tess fólki virðing og tøkk.

Nú Tummas í Heiðriksstovu hevur lagt árarnar inn vil eg minnast hann við takksemi móti mær og ættarfólki mínum og tí, ið vit vóru felags um: Kærleika til heimbygd okkara Nólsoy.

Friður verði við minninum um Tummas í Heiðriksstovu.

**Egon Hansen**

---

†

Fastir okkara

**Maria Johansen**

andaðist hósdagin 3. desember
á Landssjúkrahúsinum.

Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Ingigerð og Bette**
**Gunna, Leivur og Anna Kristina**

---

†

Okkara elskaði maður, pápi, verfaðir og abbi

**Tummas Joensen**
ættaður úr Nólsoy,
búsitandi í Havn

andaðist í heiminum, týsdagin 2. desember,
75 ára gamal.

Farið verður úr landssjúkrahúskapellinum,
leygardagin 5. desember kl. 16.00.
Jarðarferðin verður sunnudagin 6.desember
kl. 13.00 úr Vesturkirkjuni.

*Familjunnar vegna*
**Rannvá, Kathrina, Jógvan Edvard og Hanna**

Tey, ið ynskja at lata blómur ella krans, kunnu í staðin lata eina gávu til Meinigheitshúsið í Havn, konta í peningastovnunum.

---

# MERKISDAGAR

**50 ára føðingardagur**
Leygardagin 5. des. verður Jákup Danielsen, 50 ár. Føðingardagurin verður hildin saman við innbodnum.

**95 ára føðingardagur**
Mánadagin 7. des. fyllur Hans Jacob Johannesen, Skipari, Tórshavn, 95 ár. Dagurin verður hildin í Miðstovu á Láargarði millum kl. 17 og 20.

**Diamantbrúdleyp**
Fríggjadagin 4. des. hava Kirsten og Daniel Næs, Hvalba, diamantbrúðleyp. Tey, sum vilja heilsa uppá diamantbrúðarparið eru vælkomin hjá Monu og Eliesar, Toftavegur 15, frá kl. 14-19.

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 5. des. kunnu hjúnini Edith og Páll Klettskarð, í Haraldssundi, halda gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Haraldssundi í millum kl. 12 og 17. Tey, ið vilja gleðast saman við okkum, eru hjartaliga vælkomin.

**Gullbrúdleyp**
Mánadagin 7. des. hava hjúnini Óluva og Leivur Nielsen, Tórshavn, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í hølunum hjá Starvsmannafelagnum, J.H. Schrøtersgøta 9 í Tórshavn. Vinir og kenningar, ið vilja halda dagin saman við okkum, eru vælkomin í Starvsmannafelagið 7. des. kl. 18.

**Silvurbrúdleyp**
Mánadagin 7. des. hava Anna og Kári Egholm Jacobsen, Glyvrar, verið gift í 25 ár. Veitsla verður 19. des. í Bygdarhúsinum í Leirvík fyri innbodnum.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 8. des. hava hjúnini Lis og Herluf Olsen, Sørvágur, verið gift í 25 ár. Tey eru burturstødd.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 15. des. hava vit Kára og Abraham Løkin, Runavík, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík frá kl. 18. Tey ynskja at gleða okkum við at koma, kunnu siga frá á tlf. 221980 (abraham) ella 272777 (Kára) áðrenn fríggjadagin 11. des.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 29. des. halda við bæði, Pálin og Henry Olsen, Rituvík okkara silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin við veitslu í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tit, ið ynskja at gleða okkum við at koma, kunnu siga frá á tlf. 219134 (Henry) ella 223534 (Pálin). Til ber eisini at senda ein teldupost: henry-o@olivant.fo ella palin.olsen@skulin.fo áðrenn 15. desember.